# Kyndils-messu-teitið í Losjuni í Gøtu

UNDIRHALD
*Vilmund Jacobsen*

Gøta: Sunnukvøldið kl. 20 verður Kyndilsmessuteitið framført í Losjuni í Gøtu.

Hetta er eitt afturvendandi tiltak, sum Losjan í Gøtu skipar fyri. Teir, sum taka sær av at fyrireika tiltakið hesaferð, eru Magni Poulsen og Áslakkur Nesá.

Magni hevur í mong ár verið ein av fyriskiparunum av teitinum, og saman við Áslakki er hann eisini ein av teimum, ið tekur sær av undirhaldinum.

Ætlanin er at framføra Kyndilsmessuteitið einar 4-5 ferðir, helst bara 4 ferðir, tí sum Magni Poulsen tekur til:

- Vit vilja heldur byrja við einum braki og enda við einum braki, so teitið ikki gerst útvatnað.

Hann vísir á, at Kyndilsmessuteitið fevnir um lokalt skemt, almenna vitan og sang.

Fyrsta framførslan verður nú sunnukvøldið kl. 20, og ætlanin er at hava eina sýning aftrat mikukvøldið komandi.

- Síðan er ikki heilt greitt, nær hinar sýningarnar verða, men kunngjørt verður um tað seinni, sigur Magni Poulsen.

Kyndilsmessa er, 2. februar.



*Neyðugt hevur verið at seta skott í móttøku-og vaskipavnarnar umborð á Baki og Stelki, tí fiskurin rósaði ov nógv og gjørdist sjórikin. - Skipini hava annars riggað væl og kunnu fiska í munandi verri veðri enn gomlu trolararnir, sigur Ragnar Olsen á P/F Beta.*

# Gingið hampiliga væl hjá Baki og Stelki

**- Besta túrin høvdu skipini 360.000 pund av upsa, sigur Ragnar Olsen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað hevur gingið hampiliga væl hjá nýggju trolarunum hjá P/F Beta, Baki og Stelki, síðan skipini komu í føroyska fiskiskipaflotan stutt fyri árslok 2002.

Skipini gjørdu ein túr fyri jól, men hetta var í stóran mun ein royndartúrur, har reiðskapur og útgerðin annars vórðu roynd.

Síðan vórðu Bakur og Stelkur eins og onnur skip í flotanum rakt av verkfalli, sum vardi nakað út í januar.

### Góður túrur

Ragnar Olsen sigur, at skipini hava gjørt einar 4-5 túrar higartil í ár, og tann besti av hesum gav 360.000 pund, meginparturin upsi. Tað er ein góður ísfiskatúrur.

- Skipini eru góð og hava roynst væl í tí buldrasliga veðrinum, sum verið hevur í seinastuni.

Hann vísir á, at Bakur og Stelkur kunnu fiska í munandi verri veðri enn tey gomlu skipini kunnu, og tað man fara at síggjast aftur, tá ið árið er úti.

### Stórir pavnar

Sum skilst, hava spøl, trol og fiskireiðskapurin annars riggað væl, og tólini á brúnni hava eisini virkað eftir ætlan.

- Trupulleikar hava tó verið við móttøku-og vaskipavnunum á tann hátt, at fiskurin hevur rósað ov nógv og verið ov sjórikin at síggja til, tá ið hann er landaður. Hesir pavnar eru stórir, og tí hava vit nú fingið skottað teir upp, so fiskurin í teimum ikki ferðast ov nógv aftur og fram.

Ragnar Olsen sigur, at fyrst varð eitt skott sett í móttøkupavnin og síðan eitt aftrat.

- Vaskipavnurtin er langur og smalur, og tá ið skipið setir, ferðast fiskurin ov nógv. Tí hevur eisini verið neyðugt at seta skott í vaskipavnin, sigur hann.

# Nógvur roykur, men eingin fiskur

**Maskinan á Skarvi steðgaði, tá ið teir vóru á veg til lands hósmorgunin. Teir fingu í gongd aftur og komu til lands við egnari hjálp**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað reyk ógvuliga illa úr skorsteininum á Skarvi, tá ið skipið kom damlandi inn eftir Skálafjørðinum beint eftir klokkan 8 hósmorgunin. Makkarin, Trastur, sigldi beint aftanfyri og fylgdist inn eftir við Skarvi, sum næstan var fjaldur í royki.

Sosialurin var á bryggjuni, tá ið skipini løgdu at. Panikkur var eingin umborð, hóast lúðurin ýldi.

Roykur og eingin grind, plaga tey at taka til, men her var roykur, helst ikki so nógv á vási kortini og lítil fiskur í lastini.

### Roykur og sjógvur

Ragnar Olsen á P/F Beta sigur, at skipini hava verið úti tað mesta av eini viku. Veðrið hevur verið ólagaligt, og lítið er komið burtur úr, tí illa hevur verið roynandi. Skipini høvdu einar 500-600 kassar tilsamans.

- Sum eg havi skilt, steðgaði maskinan á Skarvi, tá ið skipini vóru á veg til lands. Teir fingu í gongd aftur og kláraðu til lands við egnari hjálp.

Sambært maskinmanninum umborð á Skarvi, sigur Ragnar, er neyvan tann stóri skaðin hendur.

- Veðrið hevur verið buldrasligt hendan túrin, og skipini vóru á veg inn. Trastur hevði eisini fingið nakað av sjógvi í lastina, tí trupulleikar vóru við lensingini.

### Havhestur tøkur

Tá ið Beta fekk nýggju trolararnar, Stelk og Bak, vórðu tríggir av gomlu Kuba-trolarunum lagdir. Ein teirra, Havhestur, liggur tó tøkur, um brúk skuldi verið fyri avloysaraskipi.

- Havhestur, sum er ein av teimum, ið er farin úr flotanum, hevur soleiðis verið einar 2-3 túrar, nú Skrápur hevur verið til klassingar. Men Skrápur er liðugur nú, sigur Ragnar.

Hann vísir á, at øll skipini fingu nýggjan motor í 1977-1978, og síðan tá hava eini 2-3 av skipunum aftur skift motor.

- Minnist eg rætt, er Skarvur millum teirra, sum ikki hevur skift motor á øðrum sinni, sigur Ragnar Olsen.



## HEILSANIR



**Góða elskaða Maria**
Hjartaliga tillukku við 10 ára føðingardegnum í dag. Eisini ein heilsa til Elias.
**Ynskja omma og gubbi**



**Góða fitta Maria**
Hjartaliga tillukku við 10 ára føðingardegnum 6. febr.
**Heilsan Elias**

**Góða Beinta mostir**
Her eru vit lítil. Tillukku við teimum 30.
**Jón**





**Elskaði Bjarni**
Hjartaliga tillukku við 14 ára degnum í dag.
**Ynskja mamma, Ingun, Kristin og Anna**



**Góða fitta stórasystir**
Tillukku við 3 ára degnum. Tú er tann fittasta stórasysturin í verðini.
**Lítlasystir**



Hvør skuldi trúð, at henda unga kvinnan fyllir 30.
**Heilsan vit**



**Góði Poul**
Hjartaliga tillukku við 75 ára degnum. Vit gleða okkum til kringluna.
**Bestu heilsanir vit á D6**



**Góða Elsuba Malena**
Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum. Her høvdu vit ein stuttligan túr í Suðri.
**Blíðar heilsanir omma, abbi, Hans David og mostir**

**Góði gubbi**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum í dag. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja Bjarni og Tóra**





**Góða Sólfríð**
Vit ynskja tær tillukku á 6 ára degnum og alt tað besta í framtíð tíni.
**Ynskja Finnbogi, mamma og babba**



**Góða Elsuba Malena**
Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum 28. januar. Vit elska teg.
**Blíðar heilsanir mamma, Heini og Pætur**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á middegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................
.......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ...................................................................
Bústaður: ..............................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:

**Sosialurin**

Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«